# Alt var á gosi

**Eftir dystin dugdi málverjin hjá strandingum als ikki at siga, hvussu hann bar seg at við seinastu bjargingunum, sum í roynd og veru avgjørdu dystin til fyrimuns hjá StÍF**

STEYPAFINALA
*Jákup Mørk*

Tá vit undan finaludystunum spurdu Jóhan Danielsen, hvat skuldi til fyri at vinna dystin, segði hann, at tað ráddi um at fáa sama spælið fram, sum StÍF sýndi, tá teir fyri tveimum árum síðandi gjørdust føroyameistarar.

Sum kuinnugt eydnaðist tað strandingum at vinna dystin, og tá vit eftir hetta hittu Jóhan, helt hann eisini, at orsøkin fyrst og fremst var, at teir høvdu funnið rætta spælið fram.

– Eg væntaði áðrenn dystin, at vit skuldu halda teimum longri niðri enn 29 málum, men hinvegin koyrdi álopsspælið hjá okkum sera væl. Eftir mínum tykki hevur tað ikki koyrt somikið væl higartil í ár.

## Uppsettir

Einki er at ivast í, at spælið til tíðir minti um gullárið fyri tveimum árum síðani, men ein beinleiðis frágreiðing til, hví alt hetta riggaði júst í dag, er kanska heldru torførari at siga. Jóahn helt tó fyrst og fremst, at orsøkin var, at allir leikararnir í dag vóru greiðir um, hvønn týdning dysturin hevði.

– Allir leikararnir vóru sera uppsettir til dystin. Tað kom okkum eisini til góðar, at vit vóru undirmettir av øllum, og vit fóru bara inn á vøllin við tí hugburði, at bara vit stríddust, so fór hetta kanska at verða nóg mikið.

Ofta verður tikið til, at spælið hjá StÍF svingar heldur nógv í takt við lagið hjá einstøku spælarunum. Tí vóru helst eisini mong,



*Sjálvandi skuldi máling eisini leggjast á andlitið, tá steypasigurin var vorðin veruleiki*

sum roknaðu við, at tað fór at ganga galið, tá Sveinbjørn Poulsen varð rikin av vøllin miðskeiðis í seinna hálvleiki.

– Eg haldi sjálvur, at Hjalmar og Kristian gera nøkur mistøku har, og slíkar hendingar hava ofta verið við til at oyðilagt dystir fyri okkara viðkomandi. Hesa ferð megnaðu vit tó at halda fast um sjálvan dystin, soleiðis at tað heldur eru vit, sum koma styrktir burtur úr teirri hendingini.

Seinastu løtuna stóð sjálvsagt nógv á hjá øllum pørtum. Fram til at kalla seinasta minuttin var dysturin framvegis opin, men millum annað tvær sera týdningarmiklar bjargingar frá Jóhan syrgdu tá fyri, at StÍF held fast um leiðsluna. Til hetta visti Jóhan tó ikki so nógv at siga.

– Eg veit ikki akkurát hvussu hasar bjargingarnar komu. Alt var bara fullkomuliga uppi at koyra tá, og adrenalinið pumpaði runt í kroppinum. Tað ber als ikki til at siga, hvat gongur fyri seg í høvdinum, tá so er, segði ein fegin málverji at enda.




# Stríðsviljin bar okkum

**Hóast hann bert var ætlaður til verjupartin, fekk John Petersen eisini týdningarmikla leiklut í álopsspælinum hjá strandingum í steypafinaluni**

STEYPAFINALAN
*Jákup Mørk*

Síðani John Petersen aftur fór at fáast við hondbóltsspælið, hevur hann verið ein av hornasteinunum í verjuspælinum hjá StÍF, men í finaludystinum fekk hann har umframt eisini týdningarmiklan leiklut í álopsspælinum. Hetta var tó ikki ætlanin at byrja við, segði John eftir dystin.

– Sum útgangsstøði skuldi eg bert taka lut í verjupartinum. Tá teir so fóru at mansverja, so var tað meira náttúrligt, at eg eisini kom við í álopspartinum.

## Lítil venjing

Ikki tí. John man eisini teljast millum frægastu álopsspælararnar í landinum, men sambært leikaranum sjálvum, so er venjingarstøðan ikki tann allar besta, og tí er tað fyri hansara viðkomandi ivaleyst, at hann bert verður nýttur í



*–Tað kann geva trupulleikar, um onkur brádliga rópar »trý«, og eg so ikki havi ánilsi fyri, hvat tað merkir, sigur John Petersen millum annað*

verjupartinum.

– Fyrst og fremst havi eg drigist við ein knæskaða, sum hevur gjørt, at eg ikki havi fingið vant við fullari ferð. At eg so eisini havi verið burtur frá við fótbóltslandsliðnum, umframt tað at eg eri búsitandi í Havn, gera eisini sítt til, at venjingartímarnir ikki gerast so nógvir í tali.

– Kropsliga eri eg so hampuliga væl fyri, men tá mann ikki venur saman við hinum regluliga, so kann tað væl gerast ein vansi í álopsspælinum. Um teir til dømis rópa »trý«, so havi eg ikki ánilsi fyri, hvat teir meina við, og so standi eg meira ella minni til fortreð í álopspartinum.

Hóast hann sostatt ikki hevur ant so nógv við liðfeløgunum, so er John tó ikki nakar ársungi á StÍF liðnum. Í eini 10 ár hevur hann verið roknaður millum føstu stuðlarnar, og sjálvandi ásannar hann eisini, at hetta er ein stór hjálp í so máta.

– Tað hevur so avgjørt sítt at siga. Hinvegin, so hava vit í ár nýggjan venjara, og hesin hevur so sjálvandi roynt at arbeitt nøkur nýgg álopssystem inn á liðið. Tá vit spæla við gomlu ketuni, har eg veit, hvussu allir spæla, so er tað eingin trupulleiki, men verður so skift til okkurt, sum eg ikki eri vanur við, gerst tað nógv torførari hjá mær.

At enda spurdu vit John, hvat hann helt vera størsta orsøkin til sigurin.

– Fyrst og fremst var tað stríðsviljin, sum bar okkum fram. Vit stríddust í samfullar 60 minuttir, men harumframt hevði tað sera stóran týdning, at Artur heldur okkum inni í dystinum fyrstu løtuna. Síðani koma allir betri við, og ikki minst fer Jóhan at taka heilt nógv. Fyrst og fremst vil eg tó siga, at tað var stríðsvilijn, sigur ein fegin John Petersen at enda.



# StÍF vann í sonnum gysara

**Fyri frystu ferð í ár noyddist eitt fyrstu deildarlið úr Vestmanna av vøllinum sum tapari. Eftir ein gysara av teimum heilt stóru kundi StÍF fara á pallin eftir steypinum, og fingu teir harverið hevnd fyri finalutapið fyri tveimum árum síðani**

STEYPAFINALAN
*Jákup Mørk*

Eftir at kvinnurnar hjá VÍF høvdu gjørt sítt til, at leygardagurin skuldi gerast enn ein ógloymandi hondbóltsdagur í Vestmanna, áttu menninir tørn, tá teir fóru á vøllin at dystast móti strandingum.

AT VÍF vóru favorittar at vinna dystin, var eingin sum helst ivi um. Alt árið á tamb hava teir hildið ovasta sessinum, og enn høvdu teir ikki roynt at fara av vøllinum sum taparar.

## Fóru eftir Inga

Fyrstu løtuna av dystinum var heldur ikki nógv, sum bendi á, at StÍF skuldi fara at gera nakað við favorittarnar.

Verjuspælið hjá vestmenningum hekk sera væl saman, og við brøðrunum báðum, Inga og Áka Olsen, í hopla, gekk eisini væl at skjóta mál í álopspartinum.

Strandingar vildu tó ikki á nakran hátt geva skarvin yvir, soleiðis uttan víðari. Teir stríddust sera væl, og hóast tað at byrja við sá trupult út, so góvust teir ikki.

Serliga Artur tóktist at vera væl fyri, og eina ferð fyri og aðra eftir megnaði hann við avsetti sínum at koma upp um væl vaksnu VÍF verjuna, soleiðis at bólturin kundi langast í meskarnar.

Til at bremsa spælinum hjá VÍF valdu strandingar eisini rættiliga skjótt at fara út at mansverja Inga Olsen. Hetta tóktist í nóg so stóran mun at darva VÍF spælinum, sum als ikki kom upp í somu snúningar, sum tað vanliga er á.

## Týdningarmikið mál

Hóast StÍF soleiðis megnaði at hanga í vestmenningunum, so var nærum alla tíðina líkt til, at tað skuldi eydnast vestmenningum at halda seg framman fyri.

Hvørja ferð strandinguar royndu at gera ein vørr, eydnaðist tað vestmenningum at svara aftur, men tá hálvleikurin var um at vera runnin, eydnaðiast endiliga strandingum at koma framum.

John Petersen, sum annars mest varð nýttur í verjupartinum, hevði dittað sær fram við í álopið, og við einum sera hegnisligum undirhondsskotið sendi hann bóltin í meskarnar til hálvleiksstøðuna 16-15.

Týdningurin av at enda hálvleikin væl hevur uttan iva verið sera stórur hjá strandingum. Teir vistu nú, at tað kundi lata seg gera at taka vestmenningarnar, meðan vestmenningar hinvegin høvdu fingið at vita, at teir so avgjørt ikki skuldu rokna við, at sigurin fór at koma av sær sjálvum.

## StÍF helt fast

Tað var eisini sjónligt, tá liðini komu út til seinna hálvleik, at strandingar veruliga trúu upp á møguleikan. Skjóta álopsspælið, sum seinnu árini hevur verið teirra vørumerki, men sum nærum ikki hevur verið sjónligt í ár, var nú aftur at síggja. Jóhan tók sær av alsamt fleiri bóltum, og áskoðarafjøldin royndi nú brádliga at yvirdoyva teir mongu vestmenningarnar, sum høvdu leitað sær til Havnar.

Vónirnar fyri sigrinum mundu batna alsamt, men kortini lá tað eisini í luftini, at vestmenningar so langt ífrá vóru bastir enn. Óttin fyri hesum mundi serliga komast av, at tað tóktist sum um strandingar nýttu nógv fleiri kreftir móti kropsliga sterku vestmenningunum.

Tað sá eisini út til at vera ein staðfesting av hesum, tá eini tíggju minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki. Strandingar høvdu tá eina tvey mála leiðslu, og tá tveir vestmenningar vórðu útvístir, vóru fortreytirnar fyri at gera eitt lop so avgjørt av teimum bestu. Av einhvørjari orsøk fingu strandingar tó einki burtur úr hesum, annað enn eitt brotskast, sum Eli Müller í VÍF málinum tók sær av, og lítla løtu seinni fór høllin veruliga upp á gos.

## Rok á vøllin

VÍF var á veg í kontra álop, tá John fekk eina langa sending stungna fram. Bólturin kom beint fram við StÍF beinkinum, og har gjørdi Sveinbjørn Poulsen ikki mætari enn at lofta bóltinum. Strandingar vildu vera við, at bólturin var úti, tá Sveinbjørn loftaði, og allar helst høvdu teir eisini rætt í hesum. Hinvegin høvdu dómararnir als ikki bríksla fyri, at bólturin var úti, og tí høvdu teir ikki annað val enn at geva Sveinbjørni reyða kortið.

Ein ómetaliga tung revsing hjá Sveinbjørn at taka ímóti. Hann hevði tá als ikki verið á vøllinum, og nú misti hann so mgøuleikan til at spæla ein aktivan leiklut í finaluni móti liðnum, sum hann byrjaði kappingarárið hjá. Sum um hetta ikki var nóg mikið, merkti kortið til Sveinbjørn eisini, at ein av leikarunum á vøllinum skuldi út í tveir minuttir, og brádliga vóru tað vestmenningar, sum høvdu møguleikan at vera í yvirtali, tó uttan at vera førir fyri at gera sær dælt.

Restina av dystinum var alt í høllini á gosi. Vestmenningar sansaðu, at ósigraða tíðarskeið teirra kanska stóð til at enda, og hesum royndu áskoðararnir av øllum alvi at forða. Áskoðararnir hjá strandingum nærkaðust hinvegin ekstasuni, og væl kendu sigurssangir teirra gjørdust alsamt harðmæltari.

Leysir sluppu teir tó ongantíð av vestmenningum. Tvørtur ímóti eydnaðist tað vestmenningum at koma upp á javnt, men nóg mikið til at steðga strandingunum var tað tó ikki. Enn eina ferð vunnu teir seg framum, og hesa ferð hildu teir fast. Vestmenningar høvdu nakrar møguleikar ar vinna seg upp aftur, men Jóhan svaraði áskoðarum sínum aftur, tá hesir søgdu seg eiga føroya besta málmann, og bjargaði í avgerandi løtunum, soleiðis at leiðslan kundi varðveitast.

## Costin gjørdi um seg

Fagnaðurin á vøllinum var sjálvsagt ovurstórur, tá dysturin loksins var liðugur. Áskoðarar og leikarar klemmaðust í einum stórum ruðuleika, meðan teir saman frøddust um, at teir høvdu megnað at koppa favorittunum.

Uppskriftin til hetta var fyrst og fremst eitt rimmar liðavrik, har ikki ein tann einasti leikari á liðnum sveik tað álit, sum varð sett honum. Fleiri teirra megnaðu at taka ábyrgd fyri dystargongdini, men fram um nakran annan mundi tað vera leikandi venjarin, Costin Dumitrescu, sum átti størsta partin í sigrinum. Somikið stórur var leiklutur hansara, at vestmenningar at enda royndu at mansverja hann, men tá var ov seint hjá teimum. Dysturin stóð ikki at venda, og vestmenningar máttu ásanna, at dagurin bara ikki skuldi vera teirra.

## Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
VÍF: Ingi Olsen 8(2), Sámal Joensen 5, Áki Olsen 5, Martin Hummeland 4, Johnny Joensen 4, John Zachariasen 2
StÍF: Artur Johansen 8, Marius Joensen 7, Costin Dumitrescu 6, Jón Rasmussen 5, Kristjan Petursson 3, John Petersen 2, Andre Danielsen 1
Brotskøst: VÍF 3, StÍF 3
Útvísingar: VÍF 7, StÍF 4
Diskvalifikatiónir: StÍF 1 (beinleiðis reytt)
Dómarar úr Neistanum: Hjalmar Petersen og Kristian Johansen. Høvdu kanska ikki ein av sínum allarbestu døgum, og feildómararnir vóru nakað nógvir í tali. Hava tó somikið stóra rutinu, at teir at kalla ongantíð missa tamarhaldið á einum dysti, og tá leikararnir eisini vita, at so er, lata teir dómararnar um at stýra dystinum, og royna heldur at hugsa um sjálvt spælið.



*Dramatikkurin kom í hæddina, tá Sveinbjørn Poulsen mistók seg, soleiðis at hann fekk reyða kortið, uttan at hava spælt við í dystinum*